– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Nýtt raðhús undir Kongavarða í 2 hæddum

**Nú hevur tú møguleikan at ogna tær hetta frálíka arkitektteknaða raðhúsið, vart tú ov sein/ur í fyrsta umfari.**









## Býlingurin og umhvørvið

Býlingurin verður sum frá líður ein nýggjur og heilskapaður býarpartur við skipaðum arkitekturi, ið gevur fólki avbjóðingar, frið og tryggleika. Alt verður gjørt liðugt millum húsini við vegi, gongubreyt, spælipláss, sparkivølli og hugnaligum umhvørvi, og stóru vindeyguni geva ljósinum frítt spæl og leggja Nólsoyarfjørð og Havnina opna fyri eygað.

## Uttanfyri og uttanum – liviligt og lívligt

Millum húsini er felagsøki, har grannarnir hava møguleika fyri at skipa fyri ymiskum. Har vera gróðursettir runnar, ið geva lívd og nærleika til hugna og spæl, og her eru hyljareygu, spælipláss, sparkivøllur og annað, girt við snøggum laðingum og gøtum ímillum. Beint sunnanfyri er gøta niðan á Reyn til nýggjan dagstovn og til spildurnýggja skúlan, ið stendur í gerð.

## Stílur og snið - ljós og luft

Ljósa, opna og stílreina umhvørvið uttan gongur aftur í ljósa, lætta og frískliga arkitekturinum innan. Alt er nýtt og hvítt og gjørt við besta handverki og úr besta tilfari. Tú kennir teg væl inni og hevur samstundis einastandandi gott samband við umhvørvið og umverðina. Panoramaútsýnið yvir Havnina og fjørðin má síggjast og upplivast. Húsini eru hugnalig, livilig og væl bjálvað. Tey eru løtt at umsita og halda, og eru sera bílig í rakstri. Her kanst tú savna teg um at liva eitt gott gerandislív í glæsiligum rammum.

## Innrætting

Í niðaru hædd er bilskýli, hjallur, grovkøkur, baðirúm, durur, trappugongd til ovastu hædd og køkur / alrúm / borðsstova / stova við útgongd til flísalagt útigólv / terassu. Í ovaru hædd er trappugongd, hjúnarrúm, baðirúm, klædnarúm, 2 kømur – annað við hemsi og stova / alrúm / kamar við hemsi og útgongd til útigólv / altan.

## Fakta

**Adressa** ..........undir Kongavarða 90, Argir
**Byggiár** ............2009
**Hæddir**.............2
**Gólvvídd**..........148 m²
**Grundøki**..........149 m²
**Hjallur** ..............Ja
**Bilskýli** .............Ja
**Prísuppskot** ....kr. 2.500.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**